19. novembur 2009

Framleiðslan frá Topaz er byrjað, og Trym handilin er endaliga avgreiddur

Faroe Petroleum upplýsir við hesum um framleiðslu felagsins, nú Topaz gasskeldan er byrjað at framleiða, og yvirtøkan av Glitne og Enoch oljuframleiðslueindunum er endaliga avgreidd.

Topaz byrjar framleiðslu

Alt er gingið eftir ætlan í sambandi við at framleiðslan frá Topaz gasskelduni er byrjað. Framleiðslueindin liggur í syðra parti av Norðsjónum, og Faroe Petroleum eigur 7,5 prosent av framleiðsluni. Mettað framleiðslan er 30 mió. rúmføtur um dagin, svarandi til 5.000 tunnur av olju um dagin. Netto framleiðslan til Faroe Petroleum svarar til 375 tunnur av olju um dagin.

Umframt Faroe Petroleum, eiga RWE Dea UK 57,5 prosent og GDF SUEZ E&P UK 35 prosent av gasskelduni. RWE Dea er fyristøðufelag.

Framleiðslan frá Topaz gasskelduni verður førd gjøgnum eina rørleiðing til Schooner framleiðslueindina, sum Faroe Petroleum eigur 4,83 prosent av. Samlaða nøgdin av gassi í Topaz kelduni er mett til 20 milliardir rúmføtur. Av hesum eigur Faroe Petroleum 1.5 milliardir rúmføtur.

Trym handilin endaliga avgreiddur

Faroe Petroleum hevur nú endaliga avgreitt handilin við DONG E&P Norge AS, har 10 prosent av Trym vórðu umbýtt við:

- 9,3 prosent av Glitne oljuframleiðslukelduni á norskum øki
- 1,86 prosent av Enoch oljuframleiðslukelduni á markinum millum Noregi og Bretland
- 78,3 mió. norskar krónur, harav 20 mió. norskar krónur er keypsprísur, og restin er útjavningar millum Trym, Enoch og Glitne frá 1. januar fram til 31. oktober 2009, og
- ein útsettan keypsprís upp til 20 mió. norskar krónur, tá Trym framleiðslan fer uppum eina ávísa nøgd

Samlaða framleiðslan frá Glitne og Enoch oljukeldunum tey seinastu árini hevur í miðal verið 12.000 tunnur um árið, svarandi til umleið 700 tunnur av olju um dagin til Faroe Petroleum. Møguleiki er fyri at økja um framleiðsluna frá báðum keldunum.

Framleiðslan frá hesum trimum keldunum og verandi framleiðslan frá Schooner og Wissey geva felagnum eina samlaða framleiðslu uppá meiri enn 2.000 tunnur um dagin.

Vaksandi inntøkan frá framleiðsluni hjá felagnum verður partvíst nýtt til framhaldandi leiting. Eftir at hava funnið kolvetni í tveimum teimum seinastu boringunum á Glenlivet og Tornado, skulu fimm týðandi leiti- og metingarbrunnar borast komandi árið, tríggir á Atlantsmótinum og tveir í Noregi.

Fulfíggjað tíðindaskriv á enskum sæst á www.fp.fo



Topaz gasskeldan



Enoch og Glitne oljukeldurnar